KÍ-NSÍ 2-3 (2-1):

# Góður NSÍ-moralur

**Runavíkingar stríddust allar 90 minuttirnar fyri sigrinum, og tað var meira, enn vertirnir úr Klaksvík gjørdu**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fótbóltslagið í Klaksvík er í botni í løtuni. Tríggir ósigrar á rað er ikki akkurát tað, sum viðhaldsfólkini eru von við, og helst skal leitast aftur til sera laka 1995, um ein tilsvarandi keðilig úrslitarøð skal finnast.

Men leingi tóktist tó, at talan als ikki skuldi gerast um triðja ósigurin á rað, tá NSÍ var á vitjan sunnudagin. Spælið hjá KÍ var kanska ikki tað besta, og fyri tað nógva varð miðvøllurin bara lopin um, tá verjan ístaðin sendi langt niðan móti áleyparunum, men hetta gav úrslit. Tvær ferðir slapp Julian Samuelsen - hevði fingið møguleikan í álopinum fyri frákoyrda Hjalgrím Elttør – rætti maðurin á rætta staðnum, og hann var ivaleysur. Bæði eitt og tvey null til KÍ vóru úrslit av konsekventum avslutningum, tá mótstøðan ikki var nóg ansin, og so skuldi KÍ verið á sigurskós.

### Góður moralur

Men runavíkingarnir vildu ikki gevast. Hóast spælið ikki var av tí poleraða slagnum, so hildu teir á fram í royndunum at stressa klaksvíkingarnar. Tað mundi eisini munað væl í so máta, at Christian Høgni Jacobsen við eini perlu bankaði bóltin í málið av brotsteigarmarkinum smáar tíggju minuttir fyri steðgin.

Hetta tóktist eisini geva gestunum neyðuga sálarliga sparkið, samstundis sum KÍ helst datt nakað aftur, og so var kósin løgd. Eftir steðgin gekk tað nevnliga fyri tað mesta ein vegin. Runavíkingar hildu á fram at trýsta, og áðrenn alt ov leingi fingu teir eisini lønina. Eftir frísparksinnlegg hevði KÍ-verjan trupulleikar við at rudda burtur, og so smekkaði Óli Hansen til, tá møguleikin beyðst.

Um nakað, so setti málið enn meira ferð á NSÍ. Teir spældu seg ferð eftir ferð oman móti KÍ-málinum, og mest av øllum, so var tað bara ein spurningur um tíð, áðrenn sigursmálið skuldi koma. Og hetta kom eisini, tá hálvleikurin var hálvrunnin. Eftir uppspæl í høgru var Dánjal Hansen fyrstur á innleggið, og so var fagnaðurin á runavíkingum stórur.

KÍ fekk í evstu løtu møguleika at javna, tá Erling Fles varð sendur púra leysur móti málinum, men ógvuliga eyðkennandi fyri truplu støðuna hjá KÍ í løtuni, so sendi hann omanfyri.

### Breiddin er í lagi

Sigurin var tann fyrst hjá NSÍ, síðani teir í fyrsta umfarinum vunnu í Gundadali. Tí var skilligt, at fagnaðurin var stórur, men umframt úrslitið, so høvdu runavíkingarnir eisini nógv annað at fegnast um.

Ikki minst, at teir tykjast hava ein hóp, sum er nóg breiður til at taka tey bakkøst, sum við vissu koma í einum longum og strævnum kappingarári. Hesaferð vóru hvørki Sjúrður Jacobsen, Gert Langgaard ella Ike við á liðnum, og tað eru leikarar, sum sjálvsagdur saknur er í. At liðið so kortini - og úr nærum vónleysari støðu – megnar at venda einum dysti á útivølli móti KÍ ber boð um, at knotur eru í monnum.

Enn er talan eisini um nógvar dystir, sum eru eftir í kappingini, og tí kunnu runavíkingarnir eisini hava eina væl grundaða vón um, at liðið fer at klintra longur upp eftir talvuni.

Heilt so væl grundað man vónin hjá KÍ ikki vera í løtuni. Tríggir ósigrar á rað hava sett síni sjónligu spor, og tað skilst á øllum brøgdum, at viðhaldsfólkini eru meira enn ónøgd um avrikini. Ein sigur kann tó gera undurverk í so máta, og enn er KÍ heldur ikki heilt afturúrsiglt. Skal gongdin vendast, so krevur tað tó, at stór tøk verða tikin. Og tey mugu takast í felag, soleiðis at alt liðið verður drigið rætta vegin.



*Andy Olsen og liðfelagarnir stríddu seg úr vónleysari støðu til sigurs, tá NSÍ sunnudagin vitjaði í Klaksvík*

## Týdningarmikið skump

Jónstein Petersen hjá NSÍ var sum vera man fegin um stigini, sum teir vunnu sær í Klaksvík sunnudagin. Ikki minst, tí stigini vóru úrslit av einum sonnum liðavriki, har allir lyftu í felag.

- Vit spæla heilt væl fyrstu løtuna, men teir fáa so tvey kontra-mál, sum ikki passa okkum serliga væl, men tað gevur okkum eitt lyft, tá Christian Høgni skorar. Eftir steðgin koma vit fram til nógvar møguleikar, og sjálvt um spælið kanska ikki er so flótandi, so koma vit fram til eina rúgva av møguleikum.

Ikki minst var Jónstein nøgdur um, at liðið hevði staðið royndina, hóast fráveru av fleiri týðandi spælarum.

- Vit hava verið illa sperdir hesa vikuna, har fleiri spælarar hava verið skadir og sjúkir. Tí høvdu vit ikki bestu kortini á hondini undan dystinum. Hartil hava vit havt ein keðiligan óvana við ov nógvum javnleikum. Tað hevur tú ikki ráð til, tá oddaliðini tykjast vera so væl koyrandi, sum tey eru.

- Vit hava jú ikki vunnið síðani fyrsta umfarið, so hesin sigurin var sera týdningarmikil fyri okkum. Eisini hóast spælið ikki gekk eftir ætlan, staðfesti Jónstein Petersen at enda.

-jm



## FAKTA UM DYSTIN

**VB-B36 0-3 (0-1)**
0-1: Allan Mørkøre, 18.
0-2: Alex dos Santos, 79.
0-3: Bogi Hermansen, 89.
**VB:** Bjarni Johansen – Mortan úr Hørg, Anders Sørensen, Michael í Lágabø, Kári í Lágabø – Nenad Zivanovic (Eyðstein í Lágabø, 46.), Evrad Ble, Milan Kuljic, Símun Samuelsen – Poul N. Poulsen (Kenneth Kjærbo, 77.), Dan Djurhuus
**GK:** Milan Kuljic, 39., Evrad Ble, 42., Dan Djurhuus, 51., Poul N. Poulsen, 52., Anders Sørensen, 73.
**B36:** Jákup Mikkelsen – Pól Thorsteinsson, Herbert í Lon Jacobsen, Fróði Benjaminsen, Alex dos Santos – Bergur Midjord (Bárður H. Joensen, 85.), Ingi Højsted (Klæmint Matras, 31.), Mikkjal Thomassen, Eyðun Højgaard – Allan Mørkøre, Óbi (Bogi Hermansen, 77.)
**GK:** Pól Thorsteinsson, 44., Klæmint Matras, 66.
**Dómari:** Oddmar Andreasen

# Sjálvsálitið er slitið

**KÍ-venjarin er ikki samdur í teimum, sum siga, at KÍ ikki hevur nakran geist í løtuni, men hann viðgongur, at sjálvsálitið er um at vera slitið**

KÍ
*Jákup Mørk*

Tað er einki at ivast í, at lagið var í botni hjá KÍ-hópinum sunnudagin. Ein – at síggja til – trygg 2-0 var als ikki so trygg kortini, skuldi tað vísa seg, og við einum góðum liðavriki eydnaðist NSÍ at venda dystinum.

Og heldur ikki venjarin hjá klaksvíkingunum, Ove Flindt Bjerg, var serliga fegin um úrslitið, sum hann staðfesti, ikki hevði verið nóg gott.

- Tað sigur seg jú sjálvt, at tað ikki er serliga spennandi, tá ein dystur gongur soleiðis. Og fyri okkum er tað sjálvandi sera harmiligt, haldi eg.

*Men tit fáa jú eina dreymabyrjan. Hvat er tað, sum gongur galið?*

- Tað er kanska fyrst og fremst tað, at NSÍ skorar upp á sárliga týdningarmikið tíðspunkt. Tað gevur teimum trúnna uppá, at tað kanska skal eydnast teimum at venda dystinum. Og samstundis er hetta sjálvandi eitt ordans bakkast hjá okkum at fáa beint fyri steðgin, heldur KÍ-venjarin.

### Slitið sjálvsálit

Hetta var triðja ferðin á rað, at KÍ fór av vøllinum sum taparar. Byrjanin til landskappingina hevði annars verið góð við einum sigri á HB, men sjálvsálitið, sum tann dysturin gav, tykist nú vera fullkomuliga burturi.

- Tað er jú ein vandamikil tankagongd, sum kemur, tá tú byrjar at tapa. Tá verður tú bangin fyri at spæla, og kemur tú hartil, so er næstan ov seint at venda gongdini. Tað síggja vit eisini nú, hóast klók fólk uttan fyri vøllin tosa um moral og geist á liðnum. Sjálvandi skulu hesi hava loyvi at hava sínar meiningar, men tá ein áleypari er púra blankur tveir minuttir fyri tíð, og hann skýtur uppum. So hevur tað altso einki við vantandi moral ella geist ella gera, slær venjarin fast.

### Breiddin vantar

Tað hevur ofta verið tikið til, at um KÍ vinnur á HB, so halda tey seg vera heimsmeistarar, og gloyma at hava sambandi við jørðina. Byrjanin upp á kappingarárið kundi kanska bent tann vegin, men sjálvur heldur Ove Flindt Bjerg, at hetta er ein nakað lætt-keypt frágreiðing.

- Tað kann mann sjálvandi siga, tá tú hyggur at úrslitunum higartil, men tað er ein heldur foreinklað útgáva av veruleikanum. Sjálvur haldi eg, at okkara størsti trupulleiki er, at vit hava ein heldur tunnan hóp. Vit hava fleiri ungar leikarar, sum ivaleyst kunnu gerast heilt góðir, men tað er ikki her og nú, at teir skulu vera berandi kreftir. Í løtuni er støðan bara tann, at hava vit einar 2-3 spælarar, sum ikki eru á toppinum, so eru vit ov tunnir til at byrgja upp fyri hesum. Tað er ein veruleiki, sum vit mugu fyrihalda okkum til, og til dømis hevur eingin enn grett orð um, at vit ikki hava Jacob Bymar við á liðnum longur. Hann var hóast alt toppskjútti hjá okkum í fjør. Og at vit so samstundis hava havt nakrar disciplinærar trupulleikar ger altso ikki støðuna betri, staðfestir Ove Flindt Bjerg at enda.